# 20 fólk uppsøgd á Kryvjing



*Virksemið á Kryvjing í Klaksvík er so mikið nógv minkað, at 20 fólk eru søgd úr starvi og nú verður bert arbeitt í einari vakt um dagin. Starvsfólkið fær nóg illa fulla arbeiðsviku*

*Savnsmynd*

**Fram til jóla arbeiddu tey í tveimum skiftum á Kryvjing í Klaksvík, men síðani hevur ikki verið so nógv at gera, og 20 fólk mistu teirra starv á virkinum. Í dag arbeiðir ein vakt á virkinum í mesta lagi átta tímar um dagin. Heini Gregersen, stjóri, vónar tó, at tað fer at verða meira at gera í februar ella mars mánaði**

ALIVINNA

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Árið 2003 royndist væl hjá Kryvjing. Virkið tók ímóti óvanliga nógvum fiski, og komst tað serliga av, at sjúka var í nógvum alibrúkum kring landið, og fiskurin mátti tískil slaktast í skundi. Virkið tók eisini ímóti sjúkum laksi frá Vestlaks í Oyndarfirði, sum tá ikki fekk loyvi til at flyta tann sjúka fiskin til Kollafjarðar. Men tann trupulleikin er loystur í dag, so tað minni av fiski afturat kemur til kryvjivirkið.

Tí var sera nógv at gera á virkinum – serliga fram til jóla – og arbeitt varð í tveimum vaktum. Men tá nýggja árið byrjaði var ikki nógv at gera, og 20 fólk vórðu send heim. Tey, ið eftir eru á virkinum nú, arbeiða í mesta lagi átta tímar um dagin.

– Tað er so nógv minni at gera nú, og onkrar dagar verður bert arbeitt einar seks tímar, sigur Heini Gregersen.

Laksurin, sum kemur á virkið í dag, kemur frá East Salmon í Funningsfirði, og hann er ikki sjúkur. Men Heini sigur, at prísurin í dag er so lágur, einar 17 til 18 krónur fyri kilo. Og er tað so mikið lítið, at um tað ber til at bíða, so ger man tað og vónar, at prísurin fer uppaftur. Sostatt eru hesi viðurskiftini høvuðsor-søkirnar til, at tað er so lítið av arbeiði á nýggja kryvjivirkini hjá Faroe Salmon og East Salmon á vestaru bryggju.

### Betur í mars

Men Heini Gregersen sigur tó, at útlit eru fyri, at støðan fer at batna, tá komið er út í februar ella mars.

– Okkurt týðir uppá, at útboðið serliga úr Noreg verður nógv minni tá, so tað er bara at vóna, at prísurin batnar til ta tíð, sigur hann. Hann leggur afturat, at mark eisini er fyri, hvussu longi haldast kann fram við at goyma fiskin í sjónum.

– Um so verður, kemur virkið helst aftur at arbeiða í tveimum skiftum og fer at seta fleiri fólk aftur. Men tað fer tíðin at vísa.

Annars var 2003 ikki so galið ár hjá nýggja kryvjivirkinum sjálvum. 13.200 tons av laksi varð slaktað í fjør, og virkið gav avlop. Men samanumtikið var úrslitið nakað heilt annað.

– Árið royndist serstakliga illa í alibrúkunum á sjónum, men Kryvjivirkið gav sum sagt avlop, sigur Heini Gregersen.

P/f Kryvjing byrjaði sítt virksemi í november í 2002, og fyrsta heila árið gav eitt avlop.

# Formula.fo undirveitari hjá Accenture

**Í desember mánaði í fjør skrivaði føroyska KT-fyritøkan Formula.fo undir avtalu við KT-fyritøkuna Accenture**




*Formula hevur eini stór og góð hús í Taastrup við Keypmannahavn, men hugaligt var at bjóða samstarvsfelagnum inn í hølini á Norðurbryggjuni, har sáttmálin varð undirskrivaður. Hetta var fyrsti dagur, húsið var opið fyri vanligum virksemi. Her sæst Snæbjørn í einum av hølunum á føroysku hæddini*

VEITARAAVTALA

*Tíðindaskriv*

Accenture er ein heimsumfatandi veitari av KT-loysnum og -ráðgeving, sum hevur 83.000 fólk í starvi, harav eini 400 í Danmark. Men hvat snýr avtalan seg um og hvussu er hon fingin í lag?

- Vit lósu í Computerworld, at Accenture nýliga var farið undir at menna eina apoteksloysn og at hon skuldi byggjast á standard ERP skipanina Axapta. Sjálvir hava vit ment eina Axapta grundaða loysn til føroyska apoteksverkið, so hetta var áhugavert at lesa, greiðir Anfinnur Hovgaard frá. Hann er leiðandi forritari á Formula.fo

- Av tí, at vit hava fingið gott innlit í apoteksarbeiði og samstundis hava hollan Axapta førleika, vóru vit beinanvegin sannførdir um, at vit høvdu nakað at bjóða og sóu ein góðan møguleika fyri samstarvi, sigur Snæbjørn B. Jacobsen, sum er projektleiðari á apoteksverkætlanini.

- Dagin eftir, at greinin hevði staðið í blaðnum, ringdu vit til Accenture og bjóðaðu okkum at hjálpa teimum við okkara royndum. Teir vóru eitt sindur bilsnir av hesum óvæntaða tilboð, men opnir fyri einum samstarvi. Eftir at teir høvdu sæð okkara skipan gjørdust teir sera hugaðir fyri samstarvi og vildu fegnir gagnnýta okkara førleika, sigur Snæbjørn B. Jacobsen víðari.

3 vikur seinni var samstarvsavtala undirskrivað. Hetta var fyrst í desember í fjør og í løtuni er John Mikkelsen frá Formula.fo í Danmark og forritar saman við Accenture fólkunum. Hann var eisini niðri og hjálpti til við greiningararbeiðinum fyri jól.

Formula.fo hevur í fleiri ár arbeitt miðvíst við at víðka virksemið út um landoddarnar. Málið er, at ein partur av søluni skal stava frá útlendska marknaðinum. Bæði tí at vakstrarmøguleikarnir á heimamarknaðinum eru avmarkaðir og fyri at hava meira enn tað eina beinið at standa á. Góðar vónir eru fyri hesari strategi, tí tað vísir seg, at ritbúnaður og tænastur frá Formula.fo eru væl kappingarfør — eisini uttanfyri Føroyar.

# Góð útlit fyri partabrøvum

**Í seinastu útgávuni av Útlit og Rák staðfestir Kaupthing, at gongdin í heimsbúskapinum hevur togað stóru partabrævamarknaði rnar rætta vegin**

VIRÐISBRØV

*Jákup Mørk*

Hjá teimum, sum hava gjørt íløgur í altjóða partabrøv, tykist nú at ganga rætta vegin, eftir at gongdin í hesum mestu sum bara hevur verið niðurgangandi seinasta góða árið.

Í seinastu útgávuni av Útlit og Rák staðfestir virðisbrævameklarafelagið Kaupthing, at rákið í heimsbúskapinum tykist vera vent, og at bæði lánsbrævarentur og partabrævaindexini kring heimin hækkaðu munandi seinasta ársfjórðingin av 2003. Samanlagt gjørdi hetta, at 2003 varð eitt hitt besta partabrævaárið í longritíð. Hetta skal tó haldast saman við stóra fallinum, sum hevði verið síðani heystið í 2003.

Í tíðindabrævinum frá Kaupthing verður annars tikið samanum 2003, sum annars byrjaði við sera døprum tølum á ymsu virðisbrævavísitalinum. Á sumri komu tó fyrstu ábendingarnar um, at ein verulig búskaparlig framgongd var at hóma, og tá bæði amerikanarar og europearar valdu at lækka rentuna niður á lægsta støðið í áratíggjur, stimbraði hetta samstundis undir íløguhugin, og tá tað í næstum eru útlit fyri almannakunngerð av fleiri heilt góðum roknskapum, er vísitalið á stóru børsunum farið uppeftir. Eisini í Europa, hóast viknandi dollarin viknar um kappingarførið hjá europeiskum fyritøkum mótvegis amerikonskum kappingarneytum.

Heldur óvæntað, so gjørdist talan eisini um eitt gott ár fyri lánsbrævamarknaðin. Hesin er meira proportionalt tengdur at rentuni hjá tjóðarbankunum, men eitt nú hevur fallandi talið av úrtíðarinnloysingum av dýru lánsbrøvunum havt eina positiva gongd við sær.

Í Útlit og Rák, sum annars inniheldur gjøllari frágreiðingar um gongdina á ymsu virðisbrævamarknaðunum, verður at enda mett, at útlitini fyri partabrævamarknaðin í 2004 eru góð. Ikki minst tykist tað í løtuni vera lokkandi at seta pening í norðurlendsk virðisbrøv.




























